

# Við Tobba á brúnni á Maersk Edgar

Deil:

Jan Müller

07.12.2014 - 13:28

Oljan.fo

Eftir at hava loðsað ein av heimsins størstu oljupallum, West Hercules, inn á tronga Skálafjørðin fyri nøkrum fáum mánaðum síðani, varð havnastjórin í Runavík, Tórbjørn Jacobsen, aftur til dystin fús snimma sunnumorgunin, tá eitt av teimum stóru sermerktu bláu tangaskipunum hjá danska reiðaríinum Maersk Tankers kom úr Grønlandi og legði leiðina til Føroya.

Og hesa uppgávuna megnaði kendi og virkni havnastjórin til fulnar. Maersk Edgar kom trygt og væl til bryggju í Runavík henda kavaveturs morgun.

Oljan.fo heitti á tann bæði mynda- og skriviglaða havnastjóran um at taka myndir, soleiðis at alt Føroya fólk kundi fylgja við enn eini stórhending á Skálafjørðinum, sum

hesa seinastu tíðina hevur útmerkað seg við at gerast ein umvælingarmetropolur fyri aljtóða oljuvinnu. Og hetta er eftir øllum at døma bara ein byrjan, er tað upp til eitt nú stjóran í MEST, Mouritz Mohr, sum fegnast um, at tað hevur eydnast at fáa enn eina spennandi uppgávu fyri altjóða oljuvinnuna.























